# TAÐ HENDIR …

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

## APUKATTAR Í BIOGRAFI




Menninir í Jackass eru nakað fyri seg. Teir royna ørar avbjóðingar, sum vanliga kiksað, útseta seg sjálvar fyri pínu og pínligheit og leggja fellur fyri seg sjálvar og onnur fólk. Jackass var ein sjónvarpsrøð, sum eisini endaði í biografum. Nú er upprunaliga manningin til reiðar við einum nýggjum filmi – Jackass 3D – sum varð frumsýndur í gjárkvøldið

**JACKASS 3D**
Biograffilmur
Frá hósdegnum 13/1-



## TRETTANDAKVØLD Í SKÁLAVÍK

Leygarkvøldið halda tey Trettandakvøld í Skálavík. Har skipa tey fyri borðhaldi, føroyskum dansi og gamlamannadansi. Bussar koyra í Sandoynni í sambandi við tiltakið. Tað eru dansifeløgini í oynni, sum skipa fyri kvøldinum.

**TRETTANDAKVØLD**
Skálavík
Leygarkvøldið 15/1 kl. 19.00




## RUSSISKA KOLLVELTINGIN

Myrka tíðin er góð til at lesa eina góða, tjúkka bók. Erik Kulavig hevur skrivað ein framúr góða bók um russisku kollveltingina í 1917. Hetta var ein dramatisk tíð í heimssøguni, tá ið russiska samfelagið varð kollvelt tvær ferðir eftir stuttari tíð. Hetta var byrjanin til meira enn 70 ára langt einræði í Russlandi.

**ERIK KULAVIG**
Den Russiska Revolution 1917
Gyldendal

## LENNON Í HAVN



Leygarkvøldið verður minniskonsertin Imagine Lennon í Norðurlandahúsinum í Havn. Konsertin var fyrstu ferð í Klaksvík í oktober og hevur eisini verið hildin aðrastaðni. Ein tónleikabólkur við Rana Nolsøe á odda spælir Lennon sangir, og solistarnir Karl Martin Samuelsen, Hanus G. Johansen og Jón Jacobsen tulka nakrar sangir.

**IMAGINE LENNON**
Norðurlandahúsið
Leygarkvøldið 15/1 kl. 19.30




## NÁTTARDOKUMENTAR

Ein tann kendasta og mest virda dokumentarsendingin í altjóða sjónvarpi, er amerikanska 60 Minutes, sum CBS framleiðir. Í sendingini eru nøkur gjøgnumarbeidd, áhugaverd, upplýsandi ella undirhaldandi innsløg, sum eru gjørd av nøkrum av bestu og mest royndu amerikansku sjónvarpsjournalistum. TV2 sendir dokumentarsendingina, men tíðin er ikki júst prime-time mánanátt.

**60 MINUTES**
TV2
Mánadagin 17/1 kl. 02.45

## LOKALBRAK Í ONGLANDI




Liverpool hevur fingið nýggjan venjara, og sunnudagin skal Kenny Dalglish veruliga prógva, at hann kann venda skeivu gongdini hjá felagnum. Tá skal Liverpool spæla á heimavølli ímóti grannunum í Everton, og lagt er upp til eitt brak av einum lokaldysti. Bæði feløgini stríðast við at vinna upp eftir stigatalvuni, og dysturin millum hesi feløg er eitt stríð uttan sín líka.

**LIVERPOOL-EVERTON**
Premier League
Sunnudagin 16/1 kl. 15.05